# Fáa knívin á barkan frá Jenisi av Rana

**Hann krevur treytaleyst, at tá ið nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum er liðugur, skulu tólini eisini verða tøk**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*



*–Eitt hálvt ár skulu tey fáa, at gera nýggja bygningin hjá Landssjúkrahúsinum kláran. Men hava vit ikki klárað at loyst trupulleikan tá, er onki meiri hjá mær at gera í hesi samgonguni, sigur Jenis av Rana*

Verður nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum ikki klárur at taka í nýtslu heilt stutt aftaná, at hann er liðugur í summar, fer samgongan ímillum fólkaflokkin, tjóðveldisflokkin og miðflokkin, at slitna.

Tað staðfestir Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri miðflokkin, sum er tann minsta av teimum trimum samgonguflokkunum.

Jenis av Rana er einasti tingmaður fyri miðflokkin, men tá ið samgongan ikki telur meiri enn 17 tinglimir, tolir hon ikki at ein tann einasti tingmaður tekur stuðulin aftur, tí so missir hon meirilutan í Løgtinginum.

## Fyri tað turra spott

Nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum verður liðugur á Ólavsøku.

Men tað hevur ligið í kortunum, at hann skal ikki takast í nýtslu beinanvegin, hann var liðugur. Í øllum førum er ongin peningur settur av at keypa tey neyðugu tólini og útgerðina fyri og eftir leistinum, sum samgongan hevur skorið, verður tað kanska ikki fyrrenn nakað út í 2004 ella kanska enntá í 2005, at nýggi bygningurin verður fult útgjørdur við útgerð og tólum, so at full nytta fæst burturúr honum.

Men tað fer Jenis av Rana als ikki at lata sær lynda.

– Tað er onki sum eitur: Tá ið nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum er liðugur, skal hann eisini takast í nýtslu at kalla beinanvegin.

Tað er eitt treytaleyst krav frá honum og hann sigur, at tað hevur hann gjørt bæði samgonguni, landsstýrismanninum í heilsumálum og miðflokkinum púra greitt.

– Verður bygningurin liðugur á Ólavsøku, men ongi tól keypt fyrrenn í 2004, havi eg ein veldugan politiskan trupulleika, sigur Jenis av Rana.

– Eg vil ikki liva við, at bygningurin verður liðugur, men at hann síðani kemur at standa tómur í longri tíð, soleiðis sum tað hevur ligið í kortinum.

Jenis av Rana sigur, at í minsta lagi skal avtala verða gjørt um tólini, so at tey kunnu setast upp at kalla beinanvegin.

– Í mínum hugaheimi er alt annað at halda fólk fyri tað turra spott, leggur hann afturat

## Miðflokkurin ella hann sjálvur

Hann vísur á, at miðflokkurin hevur ikki verið við til at leggja byggingina til rættis.

– Men á Ólavsøku hava vit havt ábyrgdina av Landssjúkrahúsinum í eitt heilt ár. Og hava vit ikki megnað at loyst trupulleikan við tólunum, tá ið nýggi bygningurin verður liðugur, havi eg onki at gera í samgonguni longur, sigur Jenis av Rana.

Og vil miðflokkurin ikki taka seg úr samgonguni, fer hann sjálvur at taka seg úr politikki og at víkja sæti á løgtingi fyri næsta manni á listanum hjá miðflokkinum í Suðurstreymoy.

– Jenis av Rana sigur, at hann fer ikki at krevja, at nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum skal vera fult útgjørdur, tá ið hann verður liðugur á Ólavsøku.

Men í minsta lagi skal avtala verða gjørd um tólini, so at tey kunnu verða sett upp eftir nøkrum fáum mánaðum. Eitt hálvt ár skulu tey fáa, men eg vil at tólini skulu vera bíløgd, tá ið bygningurin er liðugur, tí ein ávís leveringstíð er.

## Eitt heilt annað støði

Jenis av Rana er sjálvur lækni og hann sigur, at tað hevur ómetaligan stóran týdning at nýggi bygningurin verður tikin í nýtslu beinanvegin, tí tað fer at lyfta heilsuverkið upp á eitt heilt annað støði.

– Vit hava bíðilistar, sum eru út av lagi á summum økjum. Men tá ið nýggi bygningurin verður tikin í nýtslu, fer at bera til at fara undir ambulanta viðgerð í nógv størri mun enn nú og tað fer at stytta bíðilistar munandi og fara at gera viðurskiftini hjá sjúklingum nógv betri.

Ambulant viðgerð er viðgerð, har sjúklingurin ikki verður innlagdur og tá ið nýggi bygningurin er liðugur, kann nógv viðgerð gerast ambulant, sum ikki kann gerast ambulant nú.

Hann sigur sostatt at nýggi bygningurin er tað størsta einstaka tiltakið, sum kann gerast fyri at stytta bíðilistarnar, sum eru upp í eitt heilt ár á summum økjum.

# Bíða upp í eitt ár eftir at fáa viðgerð

**Í Føroyum er oftani long bíðitíð eftir at fáa viðgerð. Men nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum fer at fáa bíðåilistarnar munandi niður, sigur Jenis av Rana**

HEILSUVERKIÐ
*Áki Bertholdsen*



– Vit hava bíðilistar, sum eru út av lagi á summum økjum. Men tá ið nýggi bygningurin verður tikin í nýtslu, fer at stytta bíðilistar munandi og fara at gera viðurskiftini hjá sjúklingum nógv betri.

Tað sigur Jenis av Rana, løgtingsmaður. Og tí leggur hann so stóran dent á at nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum verður klárur at taka í nýtslu, tá ið hann er liðugur, at hann er til reiðar at slíta samgonguna, hendir tað ikki.

Sjálvur er hann lækni og hann sigur, at nýggi bygningurin fer at lyfta heilsuverkið upp á eitt heilt annað støði.

– Tá fer tað at bera til at fara undir ambulanta viðgerð í nógv størri mun enn nú.

Ambulant viðgerð er viðgerð, har sjúklingurin ikki verður innlagdur og tá ið nýggi bygningurin er liðugur, kann nógv viðgerð gerast ambulant, sum ikki kann gerast ambulant nú.

Hann sigur sostatt at nýggi bygningurin er tað størsta einstaka tiltakið, sum kann gerast fyri at stytta bíðilistarnar, sum eru upp í eitt heilt ár á summum økjum.

Og tað treingir harðliga til, sigur Jenis av Rana, tí bíðilistarnir í Føroyum er ógvuliga langir á summum økjum.

Hann sigur, at fyri knøppum ári síðani spurdi hann landsstýrismannin í heilsumálum um bíðilistarnir og teir eru neyvan broyttir síðani tá.

Bíðilistar verða mangan brúktir sum eitt amboð at máta støðið í heilsuverkinum.

Ein samanbering av bíðitíðunum í tí føroyska og danska sjúkrahúsverkinum av nøkrum vanligum skurðviðgerðum sær soleiðis út:

| Diagnosa | Føroyar | Danmark |
|---|---|---|
| Diskusprolaps | 23 vikur | 6 vikur |
| Gallsteinur | 12 vikur | 8 vikur |
| Grá star | 11 vikur | 15 vikur |
| Eftirgjørd mjødn/knæ | 52 vikur | 10 vikur |
| Prostata | 9 vikur | 5 vikur |
| Æðraknútar | 10 vikur | 12 vikur |
| Skurðtøka av mandlum | 3 vikur | 12 vikur |

Tølini skulu takast við fyrivarni, tí talan er um miðaltøl, og tí kunnu sjúklingar bæði bíða longri og styttri, treytað av, hvussu sjúklingarnir eru fyri. Haraftrat eru tølini fyri Danmark galdandi fyri tey sjúkrahúsini, sum hava styttst bíðitíð. Av tí at frítt sjúkrahúsval er sett í gildi, merkir hetta, at danir frítt kunnu velja tað sjúkrahúsið í landinum, sum hevur styttst bíðitíð. Hetta merkir tó ikki, at sjúklingarnir altíð velja hesi sjúkrahúsini, m.a. tí at teir sjálvir skulu gjalda ferðakostnað.



# Yvirtøkan av kirkjuni óvanlig í evropeiskum samanhangi

**Um Løgtingið kemur at avgera læruna hjá eini yvirtiknari kirkju, so er hetta eitt sera eitt óvanlig gongd í evropeiskum samanhangi, sigur Lisbet Christoffersen, sum serfrøðingur í kirkjurætti. Hon metir hetta at vera at fara aftur tíðina og samnber, og setir eisini spurnartekin við leiklutin hjá løgmanni í eini føroyskari kirkju**

KIRKJA OG LØGTING
*Theodor E. D. Olsen*



Stutt fyri nýggjár fýltist Hans Jacob Joensen, bispur, á mannagongdina í málinum um yvirtøkuna av tí føroysku fólkakirkjuni. Sjálvur segði hann, at hann kundi "fara til songar sum lutherskur bispur og vakna á morgni sum katolikkur".

Orsøkin til hetta er, at meðan tað í nógvum londum er grundlógarfest, hvørja læru fólka- ella statskirkjurnar skulu læra, so er ætlanin hjá Mentamálaráðnum, at læran hjá tí ætlaðu yvirtiknu føroysku kirkjuni skal ásetast við løgtingslóg, sum jú er munandi lættari at broyta enn ein grundlóg. Í roynd og veru kann tað tá verða tann tiltikni seytjandi maðurin í tinginum, sum kemur at gera av, hvussu kirkjan skal skipast, og hvørja læru hon skal læra.

## Óvanligt í Evropa

Lisbet Christoffersen, løgfrøðingur, ph.d., á Roskilde Universitetscenter, er serfrøðingur í kirkjurætti. Hon metir myndugleikan, ið Løgtingið nú fær yvir kirkjuni vera "en ganske usædvanlig konstruktion i europæisk kontekst", sum hon málber seg. Hon sigur ta ætlaðu føroysku skipanina minna um eina samanrenning millum stat og kirkju, og heldur tað vera skeivt, at innihaldsligi parturin í fólkakirkjuni skal stýrast av landinum.

Sum nevnt er talan jú um tað lóggevandi valdið, Løgtingið, sum sambært ætlanunum hjá Landsstýrinum skal smíða lógirnar hjá kirkjuni, og hetta sigur Lisbet Christoffersen líkjast einum stigi aftur í tíðina, tá statur og kirkja vóru eitt, og tað heldur hon vera eina løgna leið at ganga.

Lisbet Christoffersen leggur tó dent á, at hon enn ikki hevur sett seg so nógv inn í yvirtøkumálið og bert kennir tað frá føroyskum og donskum fjølmiðlum, men hon undrast stórliga á, at Løgtingið í framtíðini skal taka støðu til, um vit skulu hava eina evangelisk-lutherska fólkakirkju og kallar hetta bart út "en usædvanlig udvikling".

## Leikluturin hjá løgmanni

Hans Jacob Joensen hevur eisini áður gjørt vart við sína ónøgd, tá talan er um innseting av bispi í Føroyum. Í danska ríkinum er tað nevniliga drotningin, sum formelt innsetir bispar. Hon er nevniliga einasti persónur í ríkinum, sum hevur skyldu til at vera limur í fólkakirkjuni og hevur sostatt ikki trúarfrælsi.

Í tí ætlaðu yvirtiknu føroysku kirkjuni verður tað tó helst løgmaður, sum kemur at innseta bisp, og sum Sosialurin skilir, hóvar tað ikki øllum innan ta føroysku kirkjuna. Tað er nevniliga als ikki vist, at løgmaður yvirhøvur er limur í fólkakirkjuni, og hetta eigur sjálvandi heldur ikki at verða kravt av honum.

Lisbet Christoffersen upplýsir, at innseting av bispum verður gjørd á ymsan hátt í teimum ymisku londunum, har kirkjan er tengd at lógarverkinum.

Í 1994 samtykti Fólkatingið í Danmark eina lóg, sum sigur, at fyri at gerast bispur, skalt tú uppfylla treytirnar fyri at gerast prestur. Tá viðkomandi síðani hevur uppfylt treytirnar og fingið meirilutin á bispavalinum, har meinigheitsráð og prestar atkvøða, kann kirkjumálaráðharrin ikki broyta hetta val, og bispur er valdur. Hetta merkir, at kirkjan sjálv velur sín bisp og skipar síni viðurskifti innanhýsis.

## Óvist hvussu verður í Føroyum

Í Noregi er ein onnur loysn vald. Har kemur kirkjan við eini tilráðing, og síðani velur stjórnin bisp. Tað eru tó bert teir ráðharrarnir, sum eru limir í kirkjuni, ið hava atkvøðurætt, og í Noregi er eisini kravt, at minst helvtin av stjórnarlimunum skulu vera limir. Hendan skipanin er rættiliga óvanlig, og Lisbet Christoffersen sigur, at norska kirkjan meira kann kallast ein statskirkja enn ein fólkakirkja.

Okkum er tó ikki enn greitt, um løgmaður í framtíðini verður bundin at fylgja eini tilráðing, ella um hann ella alt Landsstýrið velur bispin í tí ætlaðu yvirtiknu føroysku kirkjuni.

Í øllum førum er greitt, at kirkjumál als ikki eru viðgjørd í arbeiðnum hjá Grundlógarnevndini, og tí verður tað Løgtingið, sum kemur avgera læruna hjá tí føroysku kirkjuni, sum altso er rættiliga óvanligt í restini av Evropu í dag.

# Úr Japan til Suðurafrika

**Plátufelagið Tutl dagførir í løtuni heimasíðuna, har tað fer at bera til hoyra brot úr føroyskum útgávum og gjalda við visakorti**

TÓNLEIKUR
*Theodor E. D. Olsen*



Í 1997 læt heimasíðan hjá Plátufelagnum Tutl upp, og ta seinastu tíðina hevur felagið arbeitt við at dagføra møguleikarnar, sum ein slík síða gevur.

Tutl hevur nevniliga søkt Vinnumálaráðið um stuðul til útbreiðsluna av føroyskum tónleiki, og her er talan ikki bert tónleik frá Tutli, men allar útgávur, sum føroyingar hava luttikið á. Vinnumálaráðið valdi at sýna ætlanunum hjá Tutli vælvild, og í løtuni starvast Jónheðin Tróndheim, fyrrverandi tekniskur leiðari í SvF, við at leggja nýtt tilfar sum eitt nú styttri tónleikabrot á heimasíðuna.

Í Tutli leggja tey dent á, at nógv kompetent fólk søktu hetta starvið, og at tey tí vóru eini luksusstøðu, tá starvið skulsi setast.

## Truplari at dagføra enn at stovna

Tað er nevniliga ikki nakar trupulleiki hjá fyritøkum í dag at fáa sær heimasíðu, men ofta er tað truplari hjá teimum at dagføra síðurnar, og tað er hetta sum Tutl hevur sett sær fyri ikki skal vera galdandi fyri tað føroyska plátufelagið.

Fyrr kundi tað nevniliga taka drúgva tíð at selja eina fløgu uttanlands. Neyðugt var nevniliga at gjalda við kekki, sum var dýrur at veksla, og tí hækkaði prísurin á tí keyptu vøruni eisini munandi. Nú hevur Tutl gjørt tað møguligt hjá viðskiftafólki at gjalda við Visakorti á heimasíðuni.

Kristian Blak, leiðari í Tutl, sigur, at heimasíðan serliga er ætlað trimum sløgum av viðskiftafólki. Hon er ætlað føroyingum uttanlands, sum ofta hava trupult við at fáa hendur á tí nýggjasta, sum er komið út av føroyskum tónleiki. Hon er somuleiðis ætlað útlendingum, sum kenna Føroyar, og sum eru í somu støðu, sum teir føroysku útisetarnir. Harafturat er hon ætlað fólki úti í stóra heimi, sum ikki kenna nakað til Føroyar, men sum frætta um oyggjalandið í t.d. útlendskum fjølmiðlum, og hesum kundaskarانum hoyrir Tutl ikki so lítið frá. Plátufelagið hevur nevniliga selt fitt av fløgum í seinastuni til Týsklands. Millum fløgurnar, sum selja væl eru Grottokonsertirnar hjá Kristian Blak, sum serliga týskarar eru áhugaðir í, Týr, ið eru vælumtóktir í Íslandi, og Eivør Pálsdóttir, sum fyri stuttum varð umrødd í einum bretskum fólkatónleikarablaði, og hetta sæst aftur á søluni har á leiðum.

Kristian Blak sigur, at tað er sera torført at menna sokallaða fysiska distribitión úti í heimi, men at tann nýggja heimasíðan loysir hendan trupulleikan. Eitt nú hevur Tutl selt føroyskan tónleik til lond sum Japan og Suðurafrika, har fólk hava vitjað heimasíðuna.